Viðmerkingar til verkætlanina Suðuroyartunnilin

Frá hagapartinum Grímsfjall og undirliggjandi haga.


Fyrst av øllum er at fegnast um at skjøtil verður settur á Suðuroyartunnilin, hann fer at hava sera stóran týdning fyri Suðuroynna og allar Føroyar bæði búskaparliga og ikki minst fólkafrøðiliga. Hetta verður eitt frambrot fyri serliga Suðuroynna tí oyggjarfólki her kann javnsetast nakað væl betur við aðrar partar av landinum, tá umræður kappingarføri, arbeiðsmøguleikar, ja allskins møguleikar.

Eigarir í Grímsfjalli, 24 eigarir í alt, komu saman til hagafund 04.des.2024, at viðgerða umfarsvegin (UFV) sum tunnilsfelagið hevur ætlanir um at gera í Hvalba. Eigarirnir, sum vara av Grímsfjalli og undirliggjandi haga kallaðu inn til hagafund við víkjandi UFV, sum er vístur fram alment. Allir eigarirnir vóru sera harmir um ikki at vera kunnaðir áðrenn hetta bleiv lagt út alment, hvørja ætlan, hægri mynduleikar hava við teirrara ogn. Hesin framgangsmátin er lítið uppbygjandi og álitisvekjandi, ikki kann sigast at tað verður lagt upp til opinleika, at frætta at privat ogn skal hýsa einum H1 UFV í almennum forum.

Hesin UFV kemur at klúgva bygdina og ikki kann sigast at vørumerki hjá bygdini heldur, at vera ein av vakrastu bygdum í Føroyum, tá hesin vegur skilir hagar, vøtn og eiðini bæði frá bygdini.

Verandi linjuføring kemur út eyst.v. Glývur krossar Heiðavegin, síðan framvið Norðbergsvatni, o.u. 70m frástøða, krossar ánna, gjøgnum velt lendi, har eldri hvalbingar halda at fornar búsetingar eru. Síðan kemur vegurin vestur á Drátt, Norðbergsvegur ein træðarvegur, framvið sethúsaøki og Hvalbiarskúla og niðan í hagan hjá Grímsfjalli, har hann fylgir lagaða bøðgarinum, klývur frágarðin og rættina frá haganum. Síðan niður av hamarinum undir Legnhúsum, sum bleiv brúktur av hvalbingum at goymdu seg fyri sjórænarum og har ættarlið eftir ættarlið av børnum hava spælt og spæla enn. Harnæst snarar hann eystur yvir eina siðsøguliga trøð, gjøgnum vátlendi og framvið Heygsvatni við eini frástøðu á o.u.15m. UFV krossar Eiðisvegin vestur á Fiskieiði, klývir rættina og frágarðin í Suður í haga frá haganum, ferð síðan gjøgnum velta jørð. Hendan jørðin kallast Leiribøður og er velt av prestum og sóknarfólki upp gjøgnum tíðirnar sum jørð hjá presti, fyri síðan at vera deild út til ognarleys at breyðføða sína familju. Alt hetta eru virðir sum ikki eru løtt at prísmeta.

Ikki eru stundir til at fara í smálutir við náttúruverndarlógina, men her er nokk nógv viðkomandi man kann taka fatur í.



Eitt sum er ørkimlandi er, at tá *"Hoyringsfundurin um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum"* á SALT var hildin, kundi tunnilsstjórin ikki svara uppá nakra alternativa linjuføring í Hvalba og Sandvík, tí tað hevur tunnilsfelagið ikki arbeitt við. Í staðin vísti hann til eina linjuføring sum landsverk hevur staðið fyri og tað er ókent hvussu gomul hon er og hvat arbeiði liggur aftanfyri, hesa hevur Tunnilsfelagið valt at brúka blint….

Also kann Tunnilsfelagið í hesum føri ikki vísa á nakra alternativa linjuføring, tað virkar sum um tað verður ikki tikið hædd fyri hvat er best fyri náttúruna og menniskjuni sum búleikast her. Heldur er tað hvat er bíligast her og nú, visjónirnar eru í hvørt fall ikki víar, sera snævurskygt.

Tá tað ræður um at verja býlingar, náttúruna og teirra tídning, kunnu okur sum eigarir fult standa inn fyri, júst tað sum sandingar leggja fram. Tað hevur alstóran tídning at broyta linjuføring í Sandsbygd so nátturan/umhvørvi verður sum minst ávirka. Hesar somu grundgevingar við vøtnum og gróðrarmiklum lendi sum er sera virðismyki fyri okkara eftirkomarar og at framtíðartryggja eyðkennini við Føroyum, hesi eru líka relevant sum hjá okkum í Hvalba sum heima á Sandi. Hesar grundgevingar eru stuðlaðar av FNU og partvíst Tjóðsavninum.

Á águrnevnda hagafundi bleiv tosað um ymsar alternativar loysnir til linjuføring:


1) Undirsjóðartunnil kemur upp úti við Klovan ávegis út í Nes, síðan gera ein nýggjan tunnil til Sandvíkar sum verur bundin í Skørðin Sandavegurin. Hetta fer at leingja tunnilin ou. 8km

2) Tunnil úr Sandvík undir bygdina sum kemur út í Slokkunum við rundkoyring og íbindingum. Tunnil ca. 4,6 km (mest nyttu-virið, ongi árin á náttúrumargfeldi)
3) Tunnil úr Sandvík við umfarsvegi um bygdina (verandi linjuføring)
4) Tunnil úr Sandvík sum kemur út mitt í bygdini har hann verður bundin í verandi landsveg Skørðin, framvið sandinum og fótbóltsvøllinum.

Uppskot 1




Uppskot 2




(Uppskoti 2 var full undirtøka fyri á hagafundinum og generelt millum Hvalbingar)

Uppskot 3



(verandi uppskot hjá tunnilsfelagnum)

Uppskot 4



(Hendan linjuføring hevur minni árin á náttúrumargfeldi enn verandi uppskot hjá tunnilsfelagnum, men hartil árin á býlingar)

Á hagafundinum var full undirtøka fyri uppskoti 2 linjuføring við tunnli undir bygdini. Hetta meta okur ikki fer at koppa nakrari verkætlan á 5milliardir+. Tað eru settar 400mill.kr. av til vegaføring í Sandvík, tunnil og UVF í Hvalba, hetta tal er sera lágt sett og ein stórur variabul. Verkætlanin er slett ikki gjøgnumførd fyri UFV í Hvalba, har eru fleiri manglar serliga við

íbindingum og atliti til býlingar, eiðini og træðirnar. Tað skulu gerast nógvar avtalur við eigarir, alt smá eigarir sum hava seyðahald til húsbrúk, hvussu skal hetta virði gerast upp??

Samanumtikið tá UFV er tikin úr verkætlanini og Sandvíkartunnulin liggur undir bygdini er játtanin mett av veksa við 120mill.kr. (framvegis variabult)

Sum løgmenn plaga at taka til, so er hendan øking frá 400 til 520mill.kr. piparnøtir í eini so stórari verkætlan.



Niðurstøðan á fundinum var at tann besta loysnin fyri at framtíðartryggja farðleiðina, sum skal fragta alla ferðslu millum Suðuroynna og restina av landinum, er at halda seg til uppskot 2, ein Sandvíkartunnil undir Hvalba, og ikki runt um bygdina.

Við hesi farðleið er náttúran, UN-spoiled, UN-touched, UN-limited osv., alt slagorð sum Visit Faroe Islands selir Føroyar og føroysku náttúruna við. Tað er nyttuvirið sum okur mugu tryggja.

Seinasta skal gerast vart við stuttu tíðarfreistina og er hetta átaluvert. Tað ber ikki til at fáa eina sakliga og grundiga gjøgnum gongd við so stuttum skotsbráði til eina so umfatandi verkætlan. Her eru fleiri økir og evnir sum mugu lýsast betur, sum ikki er møguligt, uttan at fara í smálutir við. Tískil kunnu/eru manglar í eini slíkari viðmerking sum hesari.

Vísast skal á at hagastýrið var á hoyringsfundi tann 21.des.2024

18. mars fingu okur eitt referat, eftir at hava rigt eftir tí, sí niðanfyri.

20241221_Fundur við Grímsfjall_Jens Christian Joensen
21. december 2024
08:42
Luttakarar: Jens Christian Joensen, Jóhan D. Nónsten, Teitur, Einar

Hagin nevndi:

- 24 eigarar og nógvar meiningar
- Ynski um undirføringar til Eiðini
- Ynski um undirføringar til rættir
- Óljóð frá vegnum móti húsum eigur at avmarkast
- "Friðað" jørð er við Heygsvatn (Martin Eið.) Eitt gerði
- Hegnskylda liggur í dag hjá innangarðseigarum
- Bygdin er ikki vetrarfriðað.
  SUTU greiddi frá, at trupult er at broyta linjuføringina stórvegis, og at leingja undirsjóvartunnilin til at koma upp í Hvalba ikki er realistiskt, tí so verður komið ígjøgnum gosmyrju og vánaligt fjall. SUTU er nokkso bundið av jarðfrøði, kostanaðarkarmi og trygd.
  Hinvegin ber óivað væl til at gera smærri tillagingar lokalt.

Sum sæst frá referatinum var onki útarbeitt uppáhald lagt fram um, at tað ikki ber til at gera ein tunnil undir bygdini, men dentur var lagdur á at undirsjóvartunnilin kundi ikki leingjast og koma upp í Hvalba.

Hagin/eigarirnir sakna at tað lyggur ein haldgóð grundgeving fyri trimum ella fleiri ymiskum linjuføringum frá undirsjóartunnlinum.

Nakað sum er útarbeitt og kann liggja til grund fyri at tann besta linjuføringin verður vald, fyri umhvørvi og framtíðina.

Stórt fokus er nú á sandoyarlandinum hetta sama fokus má/skal vera á suðuroyarlandinum, so tann besta og skynsamasta loysnin tryggjar bestu farleiðina fyri Føroyaland í dag og til komandi ættarlig

Við hesum skrivi vil hagastýrið heita á P/F Suðuroyartunnilin um at gera sítt arbeiði til lítar og koma við eini gjøgnumførdari vegagerð, sum kan leiða ferðsluna á allarbesta og tryggasta hátt úr undirsjóartunnlinum og víðari suður.

Vegna stýri í Grímsfjalli
Formaður: Jens Christian Joensen
Næstformaður: Hartvig Hammer
Nevndarlimur: Jóhan D. Nónstein